# Óvæntaður sigur hjá U19-landsliðnum



*Føroyska U19-landsliðið, sum týskvøldið syrgdi fyri einum sonnum bragdi, tá ið teir vunnu 3-1 á Wales á Svangaskarði.*

*mynd: Niclas Davidsen*

**Púra óvæntað vann føroyska U19-landsliðið seinasta dystin í EM-undankappinginі, tá ið teir á Toftum vunnu 3-1 á Wales, sum harvið misti møguleikan at spæla seg víðari.**

U19-KAPPING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Undan dystinum millum Føroyar og Wales, høvdu walisar bestu kortini á hondini í strembanini eftir at spæla seg víðari í EM-kappingini. Vann Wales dystin vóru teir vísir í at hava spælt seg víðari í kappingini. Men ein framúr góður innsatsur frá føroysku unglingunum, saman við einum ungarskum sigri á grikkum, førdi við sær, at walisisku unglingarnir ikki halda fram í kappingini.

### Tvær ferðir Páll

Tað sá annars út til, at alt fór at ganga eftir ætlan hjá Wales, tí longu tá ið 12 minuttir vóru leiktir, løgdu teir seg á odda við einum máli, sum framherjin David Cotterrill skoraði.

Hendan leiðslan helt sær líka til umleið ein hálvur tími var leiktur av fyrra hálvleiki, tá fingu føroyingar fríspark á miðjum vølli. Frísparkið bleiv sent inn um verjuna hjá Wales, har Ovi Magnussen tamdi hann einaferð, áðrenn hann langaði bóltin mitt í málið. Fyrsta føroyska málið í EM-undankappingini var veruleiki, og føroysku leikararnir fingu nú av álvara blóð upp á tánna.

Í seinna hálvleiki var føroyska liðið við yvirlutan, og tað gekk heldur ikki long tíð, so løgdu okkara garpar seg eisini á odda. Fimm minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki, tá ið Páll M. Joensen er knappur. Bólturin ferðast á miðvøllinum, tá ið Páll fær fatur á honum og langar til av miðjuni. Walisiski málverjin er staddur ógvuliga uttarlaga, og hann má bara hyggja at, meðan bólturin fer upp um hann og í tóma málið! Eitt sera gott mál, sum eisini komst av, at føroyska liðið undan dystinum hevði tosað um, at málverjin hjá Wales næstan virkaði sum eitt slag av aftasta manni og tískil stóð uttarlaga.

Tað tóktist sum um, at føroyska leiðslumálið av álvara tók beinini undan walisum, tí føroyingar høvdu nú takið á dystinum, og walisar vóru ikki serliga vandamiklir.

Tá ið eitt korter var eftir av dystinum, fekk heimaliðið eisini økt um leiðsluna. Arnbjørn Hansen snýtti tveir verjuleikarar hjá Wales, og tá ið hann kom inn í brotsteigin, tók walisiski málverjin beinini undan honum, og so var brotsspark. Tað tók Páll M. Joensen sær av, og hann skoraði trygt til 3-1 til Føroyar, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið.

Hin dysturin í kappingini var millum Ungarn og Grikkaland í Havn, og her eydnaðist tað Ungarn at vinna 2-1. Hetta úrslitið merkir, at tað verða bæði Ungarn og Grikkaland, ið koma víðari úr undankappingini.

***Føroyska liðið, sum vann á Wales, var hetta:***
Gunnar Nielsen, BK Frem - Jónas Tór Næss, BK Frem, Poul N. Poulsen, VB, Svenn Jacobsen, HB, Jóhan V. Gunnarsson, B36, Páll M. Joensen, HB, Jóhann E. R. Mouritsen, HB (72. Arnbjørn Hansen, EB/Str.), Jóhan Petur Poulsen, B68, Leif Niclasen, EB/Str. (86. Julian Samuelsen, KÍ), Bogi Hermansen, BK Frem (89. Debes Danielsen, NSÍ), Ovi Magnussen, B68. Tórður Thomsen úr NSÍ og Poul T. Dam úr HB sótu á beinkinum allan dystin.

# Rudda upp í óruddinum

**Heilt nógv fólk hava teknað seg til Feng Shui fyrilestrarnar, sum Synergi skipar fyri, kring landið í komandi viku. At læra at rudda upp í sínum óruddi og finna útav, hvat órudd í veruleikanum er, er eitt av evnunum til fyrilestrarnar**

FENG SHUI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Nakað er, sum bendir á, at føroyingar eru óruddiligir. Í øllum førum um gangast skal út frá undirtøkuni fyri Feng Shui tiltøkunum, sum Synergi skipar fyri í døgunum 16. til 23. oktober.

Í Havn verða tvey tiltøk leygardagin 16. oktober. Eitt fyrrapartin og eitt seinnapartin. Har varð fultteknað fyri langari tíð síðani. Bæði í Fuglafirði og í Sørvági er við at fyllast eisini, meðan klaksvíkingar hava eitt sindur betri tíð.

– Enn eru ikki nóg nógv teknað í Klaksvík til at tryggja, at skeiðið verður, men tað taka vit ikki endaliga støðu til fyrr enn hósdagin, sigur Annika Andreasen frá Synergi.

### Virkar positivt

Annika Andreasen sigur, at órudd kann hava vánaliga ávirkan á okkum, og fyrilesturin greiðir frá, hvat órudd er, og hvussu ein kemur í gongd við at rudda.

Tey, sum hava roynt tað, siga, at tað hevur eina ótrúliga positiva ávirkan at fáa at vita, hvat fyri smálutir í tí dagliga ótilvitað eru við til at stressa ein.

Annika greiðir frá, at tað sum skeiðið stutt sagt snýr seg um er at tora at sleppa sínum óruddi.

Hon vísir til eina bók, sum eitur Ryd op i dit rod, sum er um júst hetta evnið, sum tær hava valt.

– Um tú hevur ein vasa, sum tú hevur fingið frá einari mostur ella onkrum, sum stendur tær nær, standandi í stovuni, og tær veruliga ikki dámar hendan vasan, so er hann ótilvitaður við til at fáa tína orku at dala, greiðir Annika frá.

Upprudding er fyrsta stigið í Feng Shui, sum er ein 4000 ára gomul kinversk læra um at skpa góða og flótandi orku í nærumhvørvi okkara. Orðini merkja vatn og vindur. Talan er um meginreglur ið nýtast at skyna millum góðar og vángaligar lokalitetir í landslagnum og geva ábendingar um plasering av húsum og innbúgvi til tess at fremja lívsgóðskuna.

Tað verður Sigrid Sighvatsson, Feng Shui ráðgevi, sum verður skeiðsleiðari.

Fyrstu tiltøkini eru nú leygardagin í Havn. Síðani verður eitt í Klaksvík tann 19, Fuglafirði 21. og í Sørvági 23. oktober.

Freistin at tekna seg til fyrilesturin í Klaksvík er úti tann 14. Og til hinar er freistin tann 17. oktober. Í Havn er sum sagt fullteknað. Kostnaðurin fyri tiltakið er 250 krónur íroknað ein kaffimunn.



*Sigrid Sighvatsson, Feng Shui ráðgevi, verður fyrilestrarhaldari á Feng Shui tiltøkunum í Havn, Fuglafirði, Sørvági og Klaksvík*






**Kunngerð**

um valevnislistar til kommunuvalið í Sørvágs Kommunu 9. nov. 2004.

Í Sørvágs Kommunu kann ein valevnislisti hava til og við 11 valevni.

Valevnini skulu vera skilliga lýst við navni, starvi, bústaði og føðingardegi.

Listin skal vera undirskrivaður av í minsta lagi 15 og í mesta lagi 25 veljarum sum stillarum. Hjálagdur skal vera ein serligur listi yvir stillararnar, hvar teir eru skilliga lýstir við navni, starvi, bústaði og føðingardegi.

Ein persónur kann bara vera stillari á einum lista.

Listin skal latast inn av einum stillara til kommuna ella valnevndarformannin í seinasta lagi týsdagin 19. okt. 2004 kl. 18.00.

**V.v.**
**Oddur Petersen, form.**




**GER KVETTI**
**Opel Astra 1600 bíliga til sølu**



**Árg 97 · km. 85.000**

**Bilurin er í sera góðum standi og sera økonomiskur í brúki.**

**Til sølu vegna flyting**

**Áhugaði vinarliga ringi á tel 44 30 80 ella 74 30 80, ella maila á gudny78@msn.com**

**Føroya blindastovnur**

**Føroya blindastovnur bjóðar blindum og sjónveikum til:**

**Skeið í Jóla-patchwork**

**Byrjað verður**
**Mánadagin 25. oktober kl. 13.00**

**Undirvíst verður**
**mánadagar og mikudagar frá kl. 13.00 - 16.30**
**4 vikur fram**

**Áhugað kunnu venda sær til**
**Føroya blindastovn**
**á tlf.**
**31 82 22 ella 31 81 23**
**spyrjið eftir Marjun**




FØROYAPRENT
www.foroyaprent.fo · Tel. 314 555 · Fax 318 026